Vikuskiftis Sosialurin



# 1200 tons laðingargrót nýkomið úr Porkeri

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur

**Koyring við kranalastvognum fyri fastar prísir kring alt landið!**




SANDGREVSTUR P/F
NORÐUR Í GERÐI
530 FUGLAFJØRÐUR
TEL 444 121

# Rætting til avgreiðslutíðir í summar



Frá **17. juli til 11. august** eru avgreiðslutíðir okkara broyttar. Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar:

**Mánadag til fríggjadag frá kl. 10 til kl. 12**
(Ikki sum áður lýst, frá kl. 10 til kl. 13)

Frá mánadegi 14. august verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 9 til kl. 15.

Sí annars www.almannastovan.fo

HTM HJÁLPARTÓLA-MIÐSTØÐIN

almannastovan
www.almannastovan.fo

# HJÁLPIÐ JØDUNUM HEIM!

## ÍSRAELSKVØLD



Almenni Ísraelski hjálparstovnurin „Keren Hayesod", sum merkir „Sameinda Ísraelska Áheitanin" og hevur deildir kring allan heim, hevur til endamáls at hjálpa teimum veiku í Ísrael.

Grunnurin hevur meira enn hálva øld á baki og hevur verið við jødafólkinum tá ringast stóð til og eisini tá alt var gleði og gaman.

„Keren Hayesod" ætlar at stovna deild í Føroyum og kemur í hesum sambandi higar at halda trý Ísraelskvøld, sum vera:

* Mánakvøldið 17. juli kl. 19.30 í Ósáskúlanum í Klaksvík
* Týskvøldið 18. juli kl. 19.30 í Glyvra Skúla
* Mikukvøldið 19. juli kl. 19.30 í Læraraskúlahøllini á Frælsinum

Í Klaksvík og á Glyvrum fer Arne Melchior, fyrrv. fólkatingsmaður og ráðharri, at røða um viðurskiftini í Ísrael.
Filmur verður vístur og Jan Rosenberg, sum umboðar „Keren Hayesod", fer at greiða frá arbeiðinum við at hjálpa jødunum heim.

**Ókeypis atgongd - Øll eru vælkomin**

***Vinir Ísraels í Føroyum og Ísraelsfelagið Keren Hayesod***

KEREN HAYESOD
UNITED ISRAEL APPEAL
קרן היסוד-המגבית המאוחדת לישראל



# Starvsfólk til Slóðina

Slóðin er bústovnur í Tórshavn, normeraður til 5 ung fólk undir 18 ár við sosialum, kensluligum ella sálarligum trupulleikum. Endamálið við stovninum er at geva teimum ungu umsorgan og mennandi umstøður, so tey í framtíðini við treysti megna at taka ábyrgd av egnum lívi.

Í løtuni starvast umframt leiðari 7 starvsfólk á stovninum.

Trý størv eru leys at seta við byrjan 7. august 2006.

**Starvsfólk/pedagogur**
Starvið er eitt fulltíðar farloyvisstarv í tíðarskeiðnum frá 7. august 2006 til 31. januar 2007. Vit vænta at viðkomandi, ið verður settur, er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við bæði vaksin og ung, og er opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum. Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi útbúgving/royndir og tað er ein fyrimunur at viðkomandi hevur koyrikort. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Vakjandi náttarvakt**
Arbeitt verður tríggjar nætur á átta tímar og síðan seks nætur frí. Vit vænta at viðkomandi, ið settur verður, er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við bæði vaksin og ung, og er opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum. Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi útbúgving/royndir. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Reingerðarfólk**
Starvið er 10 tímar um vikuna, og verður lønt sambært sáttmála hjá avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Terja Rasmussen, leiðara, á tlf. 31 50 30 ella 22 81 30.

Umsóknarfreistin er 24. juli 2006.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:
Almannastovuna, Smyrilsvegur 20
Postboks 3096, 110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo